tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 26.10.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, ~~Eyð Jóna Eidesgaard~~

Varalimir: Jens Arna Leo Hammerfoss

Ikki møtt: Eyð Eidesgaard, fráboða forfall

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 63/23 | 23/00316-3 | Keyp av lendi frá Brand Højgaard |
| 64/23 | 23/00338-2 | Uppskot um kommunalt hundaøki |
| 65/23 | 23/00340-3 | Tvøroyrar kommunu -áheitan/áminning um íbúð til Tvøroyrar kommunu í Heiðatrønni |
| 66/23 | 23/00337-1 | Gongubreyt/fortov frá miðbýnum og inneftir |
| 67/23 | 21/00519-16 | Skipan av miðbýnum - vegir - gongubreytir - gøtuljós |
| 68/23 | 23/00334-2 | Ungdómshúsið skal hava nýggjan leiðara |
| 69/23 | 21/00076-15 | Tilboðið "Ung í vikuskiftinum" |
| 70/23 | 23/00149-1 | Lukka mál |
| 71/23 | 22/00129-1 | Lukka mál |
| 72/23 | 23/00349-2 | Varalimurin í nevndini í SEV fyri Suðuroy sagt seg frá |
| 73/23 | 23/00332-2 | Lukka mál |
| 74/23 | 23/00331-2 | Lukka mál |
| 75/23 | 23/00344-1 | Lukka mál |
| 76/23 | 23/00107-4 | Lukka mál |

| | | |
|---|---|---|
| 77/23 | 23/00330-2 | Lukka mál |
| **Til kunningar** | | |
| 22/23 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |
| | | |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um, at Eyð Eydesgaard hevur fráboða forfall til fundin.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkalla Jens Arna Leo Hasmmerfoss, ið er næst (2) valdi tiltakslimurin á lista “C” Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 at møta til býráðsfundin.

Kristin Michelsen boðar frá, at Jens Arna Leo Hammerfoss hevur frammanundan havt sæti í býráðnum, og tekur sostatt sæti í býráðnum uttan atkvøðugreiðslu.

Kristin Michelsen lesur skránna til býráðsfundin í dag og kunnar um, at enn eitt mál 72/23 er komið á skránna í dag, spurgt verður til um viðmerkingar eru til skránna.

Anita Vibergsdóttir viðmerkir og mælir til, at mál nr. 70/23 verður viðgjørt sum lukka mál -einmælt samtykt

Jónleyg J. Bech viðmerkir og mælir til, at mál nr. 71/23 verður viðgjørt sum lukka mál-
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer
Ímóti: ongin
Blankt: Kristina Roest
Málið samtykt

**Til støðutakan**

**63/23**
**23/00316-3 Keyp av lendi frá Brand Højgaard**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 66/23 |
| 2 Býráðið | 26.10.2023 | 63/23 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur breiðkað Ósavegin uttan at keypa undirlendið.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** At keypa lendið soleiðis sum avtalað við eigaran

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku deild at keypa part av matr.nr. 87 til vegabreiðkann, samb. fyriliggjandi keypsavtalu.

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**64/23**
**23/00338-2 Uppskot um kommunalt hundaøki**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 20.10.2023 | 32/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 76/23 |
| 3 Býráðið | 26.10.2023 | 64/23 |

**Málslýsing:**

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. oktober 2023:**
Samtykt at stika eitt øki av millum áargøtuna og atkomuvegin til Ítróttardepilin.
Umsitingin ger kort v. portri, skelti og ruskspannum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin.

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- & umhvørvisnevndini og Fíggjarnevndini at tilvísa økið á kortskjali á 2.517m2 til hundaøkið.

**65/23**
**23/00340-3 Tvøroyrar kommunu -áheitan/áminning um íbúð til Tvøroyrar kommunu í Heiðatrønni**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 71/23 |
| 2 Býráðið | 26.10.2023 | 65/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.10.2023**
Í samband við avtalu millum Tvøroyrar kommunu og Bústaðir um bygging av íbúðum í Heiðatrønni, var lagt fram ynskið av kommununi, um at fáa ræðisrættin yvir eina íbúð, til framleigu, eitt nú til kommunulæknar, fyri at økja um áhugan at virka í kommununi.

**Lógargrundarlag: Kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** 10.000,- kr./mðr.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá umsitingini.

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**66/23**
**23/00337-1 Gongubreyt/fortov frá miðbýnum og inneftir**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.10.2023 | 50/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 12/23 |
| 3 Býráðið | 26.10.2023 | 66/23 |

**Málslýsing:**
Uppskot um at arbeiða miðvíst við at gera gongubreyt/fortov frá miðbýnum og inneftir

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Uml. 3000 kr pr m.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2023:**
Samtykt at raðfesta gerð av gongubreytum í viðgerðini av FÆ24.
Umframt at byrja í miðbýnum, eigur gongubreytin á Hvítanesi at verða gjørd aftur.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Málið var umrætt og kunnað.

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Málið var umrøtt og kunna, málið verður viðgjørt til fíggjarætlanina 2024.

**67/23**
**21/00519-16 Skipan av miðbýnum - vegir - gongubreytir - gøtuljós**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.09.2023 | 41/23 |
| 2 Tekniska nevnd | 18.10.2023 | 45/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 72/23 |
| 4 Býráðið | 26.10.2023 | 67/23 |

**Málslýsing:**
**Ferðslunevndin 09. marts 2022:**
Uppskot um skipan av miðbýnum var víst fyri ferðslunevndini. Nevndin er kunnað.

**Tekniska deild 09-01-2023:**
Í FÆ23 eru kr. 1.5 mill. settar av til nýgerð av vegum, og 600.000 til gongubreytir.
Arbeitt verður eftir uppskotinum til skipan av økinum kring krossvegin Doktaragøta / Tvøráveg, og deildin innheintar tilboð, sum verða løgd fyri nevndina til samtyktar. Í fyrsta umfari verður fokus á at betra um veglinjuna, bæði vertikalt og horisontalt.

**Tekniska nevnd 11. januar 2023:**
Deildin innheintar tilboð, sum verður lagd fyri nevndina til samtyktar á komandi fund.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Í FÆ23 eru kr. 1.5 mill. settar av til nýgerð av vegum, og 600.000 til gongubreytir.

**Tilmælið:**
Vit eru komin so langt út á árið, at tað ikki er realistisk at náa at broyta veglinjuna norður/suður.
Uppskotið er í staðin at fara í holt við at loysa uppgávurnar við Roykstovuna, har alt skal gravast upp, rottanga og kloakk leggjast av nýggjum, og at enda gerast gongubreyt við flisum, sambært uppskotinum.
Eitt hugskot í hesum sambandinum kann vera at fara niðan í millum Glasstovuna og Roykstovuna við einari trappu í flisum sum leiðir til grøna økið omanfyri.

Kanska náa vit eisini at fara í gongd í Hotelbrekkuni, men tað krevur at vit fáa vissu fyri eftirfylgjandi asfaltering.

**Tekniska nevnd 13. september 2023:**
Samtykt at loysa uppgávurnar við Roykstovuna, har alt skal gravast upp, rottanga og kloakk leggjast av nýggjum, og at enda gerast gongubreyt við flisum, sambært uppskotinum.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2023:**
Umsitingin skjýtur upp, at kommunan, sum partur av arbeiðinum, gravar niðan millum Glasstovuna og Faktorhúsið við tí endamáli at gera tún og trappu sum leiðar niðan til grøna økið. Samstundis verður eitt stykki grivið út omanfyri Glasstovuna, har skúrurin hjá Glasstovuna kann flytast til.
Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd og fíggjarnevndini.

**68/23**
**23/00334-2 Ungdómshúsið skal hava nýggjan leiðara**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 20.10.2023 | 28/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 74/23 |
| 3 Býráðið | 26.10.2023 | 68/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.09.2023**
Tvøroyrar kommuna tørvar nýggjan leiðara til ungdómshúsið PH4, nú verandi leiðarin Arthur Djurhuus hevur sagt seg úr starvi.

Mælt verður til at lýsa sum skjótast, soleiðis at nýggjur leiðari kann byrja 1. Januar 2024.

**Lógargrundarlag:** Starvsfólkaskipan hjá Tvøroyrar Kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/24 §3 Børn og ung –Játtan avsetta

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið trivnaðar & umhvørvisnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. oktober 2023:**
Leiðarin í ungdómshúsinum hevur sagt seg úr starvi.
Einmælt samtykt at lýsa av nýggjum eftir leiðara í ungdómshúsinum Pakkhús 4.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini, og heimila umsitingini at tillaga freistirnar at søkja og seta starvið.

**69/23**
**21/00076-15 Tilboðið "Ung í vikuskiftinum"**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 15.03.2022 | 12/22 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 07.04.2022 | 14/22 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 13.06.2022 | 22/22 |
| 4 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 29.08.2022 | 7/22 |
| 5 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 15.09.2022 | 24/22 |
| 6 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 15.03.2023 | 9/23 |
| 7 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 19.04.2023 | 17/23 |
| 8 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 20.10.2023 | 30/23 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 75/23 |
| 10 Býráðið | 26.10.2023 | 69/23 |

**Málslýsing:**
Vísandi til avgerð í býráðnum tann 22.02.2022, málnr. 12/22, er samtykt at partur av ognini hjá Tvøroyrar kommunu, "posta bygningurin" skal nýtast til ungdómin í vikuskiftinum.
Tekniska deild ynskir at trivnaðar- og umhvørvisnevndin tekur støðu til ein leist fyri at innrætta hølini til ungdómin, so hesin fer at trívast væl í umhvørvinum. Tekniska deild metir at brúk er fyri uttanhýsis ráðgeving, í hesum førinum, og at innrættingin eisini verður samskipa við nýggja leiðaran á ungdómsøkinum og møguliga næmingaráðnum.
Tekniska deild metir at ein upphædd < 40.000,- til uttanhýsis ráðgeving kundi verið við til at lyft støðið av innrættninginum, av hølinum, og at hettar verður fíggja av samlaðu játtanini á FÆ22, á kr. 650.000,- til ungdóms tilboðið í posta bygninginum.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið latið trivnaðar- og umhvørvisnevndini til umrøðu og støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 15. marts 2022:**
Artur Djurhuus var á fundinum og tilgongdin var umrødd. Nevndin tók undir við at nýta uttanhýsis ráðgeving um tað í onkran mun er neyðugt.
Nevndin ynskir at næmingaráðið verður við tikið í at gera nýggja ungdóms tilboðið.
Skipa verður verður fyri fundi millum næmingaráðið, leiðaran og nevndina.

**Tekniski leiðarin 04. apríl 2022:**
Næmingaráðið kemur at greið frá hugskotum til innihald í einum rúsfríðum tilboði til ung, staðsett í «posta bygninginum».

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 07. april 2022:**
Næmingaráðið var og greiddi frá hugskotum um ynskir til innrætning og innihald. Næmingaráðið hevur verið og hugt at hølunum. Eisini hava tey verið og tosað við klassarnar frá 7. til 10. um ynskir. Hettar er felt niður í eitt skriv, sum liggur í málinum.
Vísandi til samtykt í býráðnum mál nr. 21/22 frá mars 2022, um leigumál til Posta, sum teir hava sagt upp.
Nevndin mælir til at alt økið í niðaru hæddini í «postabygninginum» verður brúkt til ungdómstilboð og at alt verandi tilboð til ung verður flutt niðan í bygningin.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 13. juni 2022:**

Nevndin ynskir, at gongd verður sett á at umvæla hølið. Veggirnir skulu málast, nýtt linoleum leggjast á gólvið, og punkteraðir rútar skulu skiftast.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 29. august 2022:**
Nevndin er kunnað um at arbeiðið fer í gongd ónsdagin 31/8-2022.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 15. september 2022:**
Nevndin heitir á Teknisku deild um at inndraga leiðaran í Pakkhús 4 í sambandi við innrætting, og at fáa eina tíðarætlan fyri nær hølið er liðugt.

**Tekniska deild 10-03-2023:**
Leiðarin í Pakkhús 4 hevur fingið uppskot um minikøk, sum hann kann góðtaka, sjálvt um hann hevði ynskt sær okkurt størri:

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 15. marts 2023:**
Nevndin heitir á leiðaran í Pakkhús 4 um at bíleggja innbúgv til tilboðið «ung í vikuskiftinum» sum skjótast.
Tekniska deild verður biðin um at bíleggja ein minikøk.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 19. april 2023:**
Nevndin er kunnað um er køkurin er á veg.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. oktober 2023:**
Samtykt at ungdómstilboðið í vikuskiftinum verður verandi í Pakkhús 4 og hølið í Posta kann nýtast til okkurt annað.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Anita Vibergsdóttir mælir til at alt verandi virksemið í ungdómshúsinum, ið nú er í Pakkhús 4, eins og ætlaða rúsfríða tilboði til ung um vikuskifti, verður staðsett í ovari hæddini í Postabygninginum.

Atkvøtt verður um tilmælið hjá Anitu Vibergsdóttir:
Fyri eru: Anita Vibergsdóttir, Jónleyg Jespersen Bech
Ímóti: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Kristina Roest og Jens Arni Leo Hammerfoss
Blankt: ongin
Málið er ikki samtykt

Atkvøtt verður um tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. oktober 2023, at ungdómstilboðið í vikuskiftinum verður verandi í Pakkhús 4 og hølið í Posta kann nýtast til okkurt annað.

Fyri eru: Kristin Michelsen, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Kristina Roest og Jens Arni Leo Hammerfoss
Ímóti: ongin
Blankt: Anita Vibergsdóttir, Jónleyg Jespersen Bech
Málið er harvið samtykt

## 72/23
## 23/00349-2 Varalimurin í nevndini í SEV fyri Suðuroy sagt seg frá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.10.2023 | 72/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 26.10.2023**
Umsitingin hevur í dag 26. okt. 2023 móttikið teldupost frá SEV:

*Til allar kommunurnar í Suðuroy.*

*Varalimurin í nevndini hjá SEV umboðandi Suðuroy Arnbjørn í Smiðjuni hevur sagt seg frá sum varalimur sambært telduposti móttikin 10. apríl 2023.*
*Sambært viðtøkum felagsins eru tað limakommurnar í Suðuroy, sum velja varalimin.*
*Fyri nevndina í SEV skal tí verða spurt um, hvørt ynskt verður, at nýggjur varalimur verður valdur. Um so er, so skal/skulu ein ella fleiri kommunur í Suðuroy boða SEV frá, at hetta verður ynskt á skrá til ein aðalfund.*
*Viðmerkjast skal, at slík fráboðan skal verða nevndini í hondum í so góðari tíð, at valið kann takast við í fundarskránna fyri viðkomandi aðalfund.*
*Vinalig heilsan*
*Elfelagið SEV*

*Kári Johansen, nevndarformaður*

*Viðtøkur fyri SEV:*

- Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevnd sambært
- Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim.
- Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi.
- Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur.
- Tá ið nevndarlimur verður valdur, skal eisini veljast varalimur, ið tekur við, tá nevndarliminum berst frá.
- Nevndarlimurin boðar varaliminum og SEV frá, tá honum berst frá.
- Nevndin skipar seg skjótast gjørligt eftir hvørt val og velur ímillum nevndarlimirnar

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Kristin Michelsen mælir til at velja umboði hjá Hvalbiar kommunu til varalim.- Einmælt samtykt

**Til kunningar**

## 22/23
## 23/00044-1 Skattatøl 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 4/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 6/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 5/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 9/23 |
| 7 Fíggjarnevndin | 31.05.2023 | 6/23 |
| 8 Býráðið | 31.05.2023 | 13/23 |
| 9 Fíggjarnevndin | 19.06.2023 | 7/23 |
| 10 Býráðið | 19.06.2023 | 18/23 |
| 11 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 8/23 |
| 12 Býráðið | 28.09.2023 | 20/23 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2023 | 11/23 |
| 14 Býráðið | 26.10.2023 | 22/23 |

**Býráðið 26. oktober 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 19:25

________________________________
Kristin Michelsen

________________________________
Anita Vibergsdóttir

________________________________
Alvi Mortensen

________________________________
Jónleyg Jespersen Bech

________________________________
Bjarni Hammer

________________________________
Kristina Roest

________________________________
Jens Arna Leo Hasmmerfoss